**Hans Petur Øregaard:**

# Uppgerðin eftir kríggið

**Aftaná týsku hersetingina kom uppgerðin. Politistar, sum høvdu hildið týskarum, fingu sekkin. Aðrir ørindasveinar hjá nasistunum fingu dóm og summir enntá deyðadóm. Tað var ótespuliga uppgávan hjá politinum at fremja hesar. Eisini fáa vit eitt íkast um ein av okkara mætastu politikkarum Jákup Frederik Øregaard, sum var beiggi Hans Petur**



Nomi og Hans Petur saman við eldri dótrini Thurid


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

## Frælsið verður fyrireikað

Heimsbardagin gongur sína gongd, og tað verður meira og meira greitt, at dagurin nærkast, tá ið týskarar mugu geva seg yvir. Tá vóru teir fleiri politistar, sum hesa tíðina hittust í loyndum at tosa um, hvussu berast skuldi at við løgregluni, tá ið Danmark aftur var frælst. Hóast væl var ansað eftir, kundi ein ikki vara seg fyri, at ikki onkur nasisinnaður var uppi í. Tað vísti seg eisini seinni, at ein slíkur hevði verið í tí bólkinum, har Hans Petur hevði verið við.

Í slíkum virksemi var eisini skipað fyri trygdartiltøkum at verja luttakararnar móti avleiðingunum, um hetta hendi. Luttakararnir skuldu vita minst møguligt um hvønn annan. Tí hendi eingin skaði av hesum.

Tað ráddi um at vera væl fyrireikaður, tí roknast kundi við ruðuleika, um ikki løgreglan tók við beinanvegin, tá ið týskarar góvu seg yvir. Tað gjørdi hon eisini. Víst varð hersetingin av Danmark lýst at vera av 4. mai, men við gildi frá 5. mai. Til tá skuldi bíðast. Onkur gjørdi ov skjótt av og varð skotin av týskum handlangarum, áðrenn hesir góvu seg yvir.

Allir tøkir politistar møttu eisini upp beinanvegin 5. mai. Millum hesar vóru eisini fleiri, sum høvdu verið nasistar, men hesir vórðu sendir til hús beinanvegin.

Tilsamans 333 politistar fingu sekkin aftan á bardagan fyri at hava samstarvað meira enn gott var við týska hersetingarvaldið.

Ein av hesum var politistjórin í Keypmannahavn Ivan Stamm. Hann var sera gemytligur og tyktist at vera eins blíður við týskarar sum danir. Ein kanning seinni vísti, at hann hevði ikki forbrotið seg. Men álitið var farið, og hann endaði sína yrkisleið sum sigarhandlari.

Aftaná kríggið var ein størri rættaruppgerð við teir, sum høvdu runnið ørindi fyri týskar. Í fyrsta umfari vóru fleiri túsund fólk tikin, og teir sum stóðu fyri hesum handtøkum vóru frælsishermenninir. Tey flestu av teimum tiknu vóru latin leys aftur beinanvegin, men nógv komu fyri rættin. Teir ringastu yvirgangsmenninir fingu deyðarevsing og vóru avrættaðir. Danski ríkisdagurin hevði nevniliga við afturvirkandi kraft sett deyðarevsing í gildi aftur. Hildið verður tó, at nógvir av teimum stóru fiskunum sluppu ov væl. Millum hesar vóru teir, sum høvdu ríkað seg upp av at arbeiða fyri týskarar. Nógv hildu eisini, at politikkararnir sluppu ov væl.

Avsøgdu deyðadómarnir blivu fullførdir frá 1946-50. Nógvir politistar vóru tætt uppat hesum hendingum. Tær komu eisini at ávirka teir heilt nógv og merkti teir fyri lívið.

Í serligari grein verður sagt meira frá hesum.



Í Føroyum dámdi Hans Petur væl at rógva út. Her er hann saman við beiggjanum Sylverius



Tá ið Hans Petur kom niður kom hann til systrina Grethu. Her sæst hon saman við manninum Harald og soninum Egon. Gretha gjørdist 103 ár. Her skal verða skoytt uppí, at mamma hennara Petronella, sum kom av Trøllanesi átti eisini aðra systir í Lorvík. Hetta var Sigga Elisabeth, sum giftist við Fríðrik Hansen

## Kundi eins væl verið skotin

Sína mest skakandi uppliving hevði Hans Petur beint eftir kríggið. Ein dagin vóru teir fýra politistar, sum høvdu fingið frí og vóru á veg heim á súklum. Eina ferð fara teir hvør sína leið. Tveir fara eftir Nørrebrogade og tveir eftir Øster Farimagsgade. Eina løtu seinni hoyrir Hans Petur nøkur skot. Hann gevur sær ikki far um tey, tí so stutt eftir hersetingina var hetta framvegis dagligur kostur. Men seinni kemur hann eftir, at tað vóru teir báðir starvsfelagarnir, sum teir skiltust frá, sum eru blivnir skotnir beint eftir, at teir vóru farnir frá hvørjum øðrum. Hetta var sera skakandi, og Hans Petur kundu fáa marruna av hesum langt aftaná, tá ið hann hugsaði um, at tað kundi eins væl verið hann, sum var ein av teimum skotnu.